## Schaeffler ætlar at keypa Mercedes



Ein av mest múgvandi persónum í Týsklandi, 66 ára gamla Maria-Elisabeth Schaeffler, sum er ein av eigarunum av Schaeffler Group, ið er ein av heimsins størstu framleiðarum av kúluleigum, hevur ætlanir um at keypa Mercedes-Benz bilverksmiðjuna, Daimler AG. At hon meinar tað í álvara, sæst av at hon í august keypti stóru týsku Continental dekkverksmiðjuna.

# Nýtt tónleikaverk á Heystkonsert

**Býarlívið í London hevur givið íblastur til spildurnýtt tónleikaverk eftir Páll Sólstein, sum verður frumframført á Heystkonsertunum hjá Aldubáruni um vikuskiftið**

TÓNLEIKUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Aldubáran man vera tann bólkurin í Føroyum, ið framførir flest nýskrivaðan partiturtónleik. Til næstan hvørja konsert hjá Aldubáruni er ein frumframførsla, og Heystkonsertin 2008 er einki undantak.

### Londonferð gav íblástur

Tónasmiðjurin hesaferð er hornpælarin Páll Sólstein, sum fekk hugskotið at skriva eina trio bygd á býarlívið í London eftir eina stutta konsertferð hjá Aldubáru Málmblásara Trio í bretska høvuðsstaðnum.

Nýggja trioin verður frumframførd á heystkonsertunum hjá Aldubáru Málmblásara Trio, sum verða um vikuskiftið.

Í ár fer Aldubáran at hava tvær heystkonsertir. Fyrra konsertin verður í leygardagin 27. í Leikalund í Klaksvík. Til hesa konsertina fer Aldubáru Málmblásara trio at spæla eitt sindur léttari tónleik so sum Georg Gershwin og nakrar føroyskar sangir, umframt nýggja verkið hjá Pálli Sólstein.

Seinna konsertin verður í Norðurlandahúsinum í Havn sunnudagin 28. september kl 16. Á hesari konsertini verður nýggjari tónleikur spældur av millum annað Nils V. Bentzon, Páll Sólstein og Atla Petersen.

Konsertinar vara umleið 60-70 minuttir og eru uttan steðg.

Stuðlað konsertunum hava: Tórshavnar Býráð, Mentamálaráðið og Mentanargrunnurin Landsins.



*Tónleikarnir í Aldubáru Màlmblásara Trio er Johan Hentze á trompet, Páll Sólstein á horn og Andras Olsen á trombon.*

# Vandamikil gongd í Suðuroy

**Eitt minkandi fólkatal og ein hækkandi miðalaldur merkja, at Suðuroy gongur móti eini truplari tíð. Gongdin í modernaða samfelagnum merkir, at fólk flyta seg inn móti stórbýunum, men ikki er vist, um hetta er støðan í føroyska útjaðaranum**

ÍBÚGVAVIÐURSKIFTI
*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

Ein vandamikil gongd í fólkatalinum í Suðuroy hevur verið seinastu árini, og 2008 sær út til at gerast ein dyggur smellur. Einans 29 børn verða borin í heim í Suðuroy í ár, 19 hava longu sæð dagsins ljós, og einans 10 eru ávegis, veit Suðuroyar Sjúkrahús at siga.

Undanfarin ár hevur burðartalið sveiggjað, men gongdin hevur verið rættiliga greið. 1990 var metár við yvir 100 nýføddum, og í 2006 vóru 73 børn fødd, men hesi eru serdømi. Bæði í 2005 og 2007 vóru 53 fødd, og talið hevur annars sveiggjað millum 40 og 60 seinastu árini frá 1995.

Lága talið av nýføddum hevur við sær eina sera óhepna gongd fyri oynna. Miðaldurin hækkar, og komandi ættarlið koma at møta størri mótstøðu enn undanfarin.

Berandi aldursbólkurin eru tey í arbeiðsførum aldri. Hini, ið annaðhvørt eru undir ella yvir, kosta samfelagnum meir enn tey geva. Hetta er sjálvsagt náttúrligt, og tí báðir aldursbólkarnir antin hava tænt samfelagnum, ella eru ein íløga í tað. Sostætt veitir ein hækkandi miðalaldur ongum gagn.




### Myrk framtíð

Við ársbyrjan 2008 var íbúgvatalið í Suðuroy 4.915, hetta er 10,2% av samlaða talinum fyri Føroyar. Í verandi løtu eru 658 fólkaskúlanæmingar í teimum átta skúlunum í Suðuroy, og tað talið er einans 9,3% av samlaða talinum. Av teimum átta skúlunum eru tríggir, ið einans hýsa einum flokki á tríggjar næmingar, og tveir hava einans tveir flokkar. Til dømis eru tveir triðjafloksnæmingar og ein í fjórða flokki í Sandvík.

Í fólkaskúlalógini, løgtingslóg nr. 125, kap. 2 §13, stendur at skúlar, ið hýsa millum 1-14 næmingar hava ein flokk, 15-30 tveir flokkar, 31-48 tríggjar flokkar, og so framvegis.

Í høvuðsstaðnum er næmingatalið á stóru skúlunum yvir 500, ið ikki er langt frá samlaða talinum frá átta skúlum í Suðuroy. Og talið í Suðuroy sær ikki út til at ganga móti eini ljósari framtíð. Í verandi løtu sær tað út sum ein árgangur av fyrstaflokksnæmingum í allari Suðuroynni 2015 kemur at ljóða á 29 næmingar í mun til teir 56, sum eru í dag.

Enn er ikki greitt hvat verður gjørt við hetta. Ein loysn kundi verið at lagt skúlarnar ella flokkarnar saman, og havt alt á einum staði. Men hvat hevði tað gjørt við Suðuroynna og viðurskiftini har.

Trivnaður í øllum landinum skal sjálvandi raðfestast høgt, men annaðhvørt hetta letur seg gera verður upp til landsins myndugleikar.